LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

**Løgtingið**

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 007/2020 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Kristinu Háfoss, løgtingsmanni um Korona tilbúgvingarætlan fyri Føroyar v.m.**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Hví er ongin langtíðar Korona tilbúgvingarætlan gjørd og sett í verk?
2. Heldur løgmaður tað vera rætt at gera eina langtíðar Korona tilbúgvingarætlan, t.d. við 5 tilbúgvingarstigum í mun til, hvussu nógv smitta er í landinum?
3. Hví hevur landsstýrið ikki valt at uppraðfesta Heilsufrøðiligu Starvsstovuna við starvsfólki og útgerð samsvarandi økta tørvinum, tá landamørkini lótu upp í juni, og økta kanningartørvinum nú í august?
4. Hví bað landsstýrið ikki Løgtingið um heimild til at taka gjøld fyri Covid-19 kanningar frá ferðafólki í juni mánaða, tá Løgtingið var saman, og tað varð greitt, at heimildin manglaði?
5. Hví valdi landsstýrið ikki at kanna ferðafólk 2 ferðir, eftir at landamørkini lótu upp?
6. Ætlar landsstýrið at biðja um lógarheimild fyri at krevja, at ferðafólk verða kannað 2 ferðir?
7. Hví velur landsstýrið ikki at taka ábyrgd av landamørkum Føroya við at seta egin krøv til, hvussu nógva smittu lond kunnu hava, fyri at ferðafólk kunnu koma til Føroyar?

**Svar:**

**Til 1:**

Landsstýrið hevur saman við myndugleikunum frá fyrsta degi hildið fast í somu ætlan. Tað hevur verið ein stór styrki at sleppa undan at skifta ætlan í tíð og ótíð. Við at geva hvørjum einstøkum bæði ábyrgd og álit hava vit megnað at avbyrgt og niðurbart koronusmittuna so hvørt hon hevur vunnið seg fram í føroyska samfelagnum.

Tá ið vit lótu føroyska samfelagið upp aftur var tað eftir grundregluni: vit skulu hava størst møguligan samfelagsligan ágóða fyri minst møguligan vøkstur í smittubreiðingini.

Ein høvuðsorsøk til, at landsstýrið kundi lata landið upp aftur, var, at føroyska tilbúgvingin á teimum ymisku økjunum var til reiðar, um ein onnur koronubylgja fór at taka seg upp.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

**Til 2:**

Ein háttur sum ofta verður nýttur í tilbúgvingarætlanum er at býta hana upp í tilbúgvingarstig. Tað er væl hugsandi, at tílíkur háttur eisini kann nýtast í framtíðini.

**Til 3:**

Sum kunnugt eru koronakanningarnar í tveimum liðum. Fyrra liðið at poda hin einstaka, seinna liðið at kanna tiknu royndina á royndarstovu. Heilsufrøðiliga Starvsstova hevur ongantíð fingist við fyrra liðin av kanningini, men bert hin seinna.

Ein uppraðfesting av økinum kann ikki bara fara fram á royndarstovukanningarøkinum, men má eisini henda á podingarøkinum.

Út frá eini heildarmeting hevur tí valt loysnina við aktørum útifrá sum virkar væl í praksis.

**Til 4:**

Landsstýrið hevur í fleiri umførum umrøtt spurningin um at taka gjald frá ferðafólki til hesar kanningar. Sambært § 28 í epidemilógini rindar landsstýrið allar útreiðslur eftir lógini. Heimild er sostatt ikki í galdandi føroysku epidemilóg til at taka gjøld frá ferðafólki fyri koronakanningar. Samstundis hevur málsviðgerðin víst, at tað ikki er møguligt at broyta hesa áseting í epidemilógini.

Landsstýrið hevur tí kannað, um heimild kann fáast innan onnur málsøki. Hetta arbeiði er nú komið á mál, og farið er undir at fyrireika eitt lógaruppskot.

**Til 5:**

Epideminevndin hevur, sambært § 16, stk. 1 í epidemilógini, álagt øllum, sum koma til Føroya fram til og við 31. oktober 2020, at lata seg kanna fyri COVID-19 av einum lækna ella einum, sum arbeiðir eftir delegatión frá lækna. Av tí, at § 16, stk. 1 bert er galdandi fyri "enhver, der ankommer til Færøerne", verður ikki mett, at heimild er í epidemilógini til at áleggja øllum at verða kannað 6. dagin eftir komu til Føroya. Epideminevndin hevur tí ikki tikið avgerð um kanning 6. dag, men á fundum tann 21. juli og 27. juli 2020 mælti Epidemikommissiónin landsstýrinum til at seta pening av til, at øll ferðafólk fáa tilboð um at kanna seg fyri Covid-19 á 6. degi fyri komu til Føroya.

Tann 5. august fráboðaði løgmaður, at øll ferðandi verða biðin um at lata seg kanna aftur á 6. degi.

**Til 6:**

Tað hevur virkað væl higartil at geva hvørjum einstøkum ábyrgd og álit, og tí verður ikki mett neyðugt at tvinga fólk við lóg.

**Til 7:**

Tíðliga undir koronatíðarskeiðinum tók landsstýrið av sínum eintingum stig til at lata landamørkini aftur. Hetta var ein neyðug og úrslitagóð avgerð.

Annars er at siga, at eftir ræðislógini § 1 stk. 2 nr. 22 er marknaeftirlit á donskum hondum. Av tí at marknaeftirlit ikki er Føroyar og Danmarkar í millum hevur danska stjórnin aftra seg við at hava ymsar reglur fyri atgongd hjá útlendingum í Danmark og í Føroyum.

Í Tinganesi, 21. august 2020

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður